# FØROYAR EIGA

FØROYSKIR **POLTIKARAR** DUGA OV ILLA AT **SAMSKIFTA** VIÐ **VELJARAN** Á MONGU **SAMSKIFTISPALLUNUM**, HELDUR **PER HØJGAARD**, SUM HEVUR **ARBEITT** SUM **SAMSKIFTISRÁÐGEVI** Í FLEIRI ÁR



**POLITIKKUR**
Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Føroyar eiga einki politiskt superbrand.

Her er eingin Obama. Eingin Blair. Eingin Fogh Rasmussen.

Langt frá tí.

Men vit eiga Kaj Leo Johannesen, Høgna Hoydal og Heina O. Heinesen

Fáur føroyskur politikari skarar framúr sum stórt politiskt brand.

Hinvegin hava vit í Føroyum politikarar, ið standa seg væl í heimliga politiska og samskiftisliga umhvørvinum, hóast teir ikki eru í superliguni hjá politisku brandunum.

Tað er nakað av tí, sum journalisturin Per Højgaard heldur um politisk brand í Føroyum.

Per Højgaard er útbúgvin journalistur, og hann hevur arbeitt sum pro-

### Størri krøv

Nógv er broytt í føroyskum politikki seinastu 40 árini. Broytingarnar seinastu 10 árini hava verið serliga stórar.

Samskiftismiðlarnir við útvarpi, sjónvarpi, politiskt óheftum bløðum, tíðindaportalum á internetinum, heimasíðum, teldupostum, bloggum, kjattsíðum og øðrum eru eitt lutvís nýtt fyribrigdi.

Nýggju miðlarnar hava kollvelt tíðindaheimin, og teir hava stóra ávirkan á politiska samskiftið.

Tíðin, har røðarapallurin í Løgtinginum, valfundir í bygdarhúsum og alinlangar greinar í partapolitskum bløðunum vóru samskiftispallarnir, er væl og virðiliga farin.

Krøvini til nútímans politikaran eru samstundis herd munandi.

Politikarin skal duga at brúka nýggju fjølmiðlarnar, um hann vil hava samband við sínar veljarar. Tað er har, politikarin skal marknaðarføra seg og síni

> »» *Politikkur fer eftirhondini fyri mesta partin fram í fjølmiðlunum. Tað er har, tú røkkur út til veljaran við tínum sjónarmiðum*

fessionellur samskiftisráðgevi í fleiri ár. Tá hann skal meta um dygdina á politikarum, vísir hann millum annað á hugsanina um »politiska superbrandið«. Hann nevnir bókina »Det Politiske Superbrand,« sum donsku Mads Christian Esbensen og Bo Bredsgaard hava givið út.

– Tað er ein áhugaverd bók til teirra, sum vilja vita, hvussu góði politikarin er settur saman, sigur Per Højgaard, sum tekur støði í politiska superbrandinum, og nevnir hættirnar sum máta politiska brandið.

Á 331 blaðsíðum tekna donsku høvundarnir vangamyndina av tí fullkomna politikarunum, og gera greitt, hvørji krøv verða sett politiska superbrandinum.

Tess fleiri av ávísum krøvum, politikarin kann liva upp til, tess sterkari brand er hann.

Krøvini og lyklaorðini, sum eyðkenna politiska flogvitið, eru seks í tali. Tað er sjónligheit. Politiskt handverk. Greiðar visiónir. Munagott samskifti við veljaran. Trúvirði. Og karisma

Fevnir politikarin væl og virðiliga um hesi, so ert tú eitt politiskt superbrand.

sjónarmið. Summi halda, at í Føroyum er tørvurin á slíkari miðlagrundaðari profilering vorðin størri, eftir at Føroyar gjørdust eitt valdømi.

Kappingin um umtaluna í almenna rúminum stór, og tað ræður um at skilja seg burtur úr rúgvuni. Ljós verður varpað á einstaklingin, sum traðkar fram sum umboð fyri seg sjálvan heldur enn sín politiska flokk.

Per Højgaard hevur í fleiri á starvast sum samskiftisráðgevi. Frammanundan arbeiddi hann sum tíðindamaður, har hann millum annað var í starvi á Christianborg. Hann hevur innlit í politiska umhvørvið í Føroyum og Danmark.

Hann heldur, at hóast framstigini eru stór, gagnnýta føroyskir politikkarar framvegis ikki mongu samskiftispallarnar til fulnar.

– Politikkur fer eftirhondini fyri mesta partin fram í fjølmiðlunum. Tað er har, tú røkkur út til veljaran við tínum sjónarmiðum. Tað vita føroyskir politikarar, men tilvitanin, hvussu politiska samskiftið kann skipast og gagnnýtast, kann verða størri, sigur Per Højgaard.

Tað ræður ikki longur bara um at duga politiska handverkið. Tað var eyðkennið hjá Atla Dam, Paula Ellefsen, Jógvani Sundstein og hinum, sum myndaðu føroyskan politikk fyri nøkrum árum síðani.

– Teir arbeiddu og samskiftu út frá fortreytunum, sum vóru tá. Nú eru fortreytirnar heilt øðrvísi, tí politiska samskiftið er flutt út í miðlarnar, sum arbeiða skjótt, og har veljarin hevur møguleika at svara eftir stuttari tíð. Fortreytirnar eru kollveltar, sigur Per Højgaard.

### Skeiv orð og ongin vinkul

Veljarin er drigin nærri politiska leikvøllinum, og útsýnið av áskoðaraplássunum hevur ongantíð verið betri.

Málbólkurin av veljarum er stórur. Starvsheitini eru sjómaður, flaka-

## Floksformenn eru blandað politisk brand

*Sosialurin hevur heitt á journalistin Per Højgaard, ið hevur arbeitt sum professionellur samskiftisráðgevi í fleiri ár, um at gera eina brandmeting og meting av samskiftisdygdunum hjá formonnunum í politisku flokkunum. Per Højgaard tekur fyrivarni fyri, at hann ikki hevur havt høvi at gera eina systematiska kanning av floksformonnunum til tess at finna fram til teirra brandprofilar. Metingin niðanfyri er gjørd við støði í subjektivum eygleiðingum av formonnunum í almenna rúminum og í fjølmiðlunum yvir fleiri ár.*

Til stuttleika fáa floksformenninir ein karakter í metingini av brandi og samskiftisdygdum. *(5 stjørnur er hægsti karakterur)*




**Jóannes Eidesgaard** JAVNAÐARFLOKKURIN

Javnaðarhøvdingurin er ein **»gomul rotta«** í føroyskum politikki. Tá væl liggur fyri, fær hann politiskt handverk og samskifti at spæla væl saman. Vandin við rutinuni er, at hin rutineraði slær autopilotin til. Tað hepnast sjáldan væl. Í tí sterka sjónvarpsmiðlinum stendur Jóannes Eidesgaard seg ójavnt. Stundum brennur hann ígjøgnum sum ein debatørur av Guds náði. Stundum avdúkar kropsmálið vreiði ella ónøgd, og tað er onnur av tveimum deyðssyndum í persónligum samskifti. Í flestum førum slær Jóannes Eidesgaard ígjøgnum sum røðari. Hansara politiska brand er gott men eisini slitið.




**Kaj Leo Johannesen** SAMBANDSFLOKKURIN

Ein stjórnarleiðari eigur at vera eitt sterkt politiskt brand. Tað er Kaj Leo Johannesen ikki enn, og tí hevur hann her eina avbjóðing. Vert er tó at vita, at leiðarar verða vigaðir á øðrvísi skál enn onnur. Kaj Leo Johannesen hevur verið í óhepnum fjølmiðlatilburðum og verið týðiliga kroystur fyri snurrandi myndatólum. Tí eru hansara politiski autoritetur og samskiftisliga gjøgnumslagskraft framvegis í veikara lagi. Stundum bleiktrar stjørnan kortini, og tá hómast eitt brand, sum higartil hevur verið heldur væl fjalt. Løgmaður er fram um alt sympatiskur, og tað skal ikki undirmetast.




**Jenis av Rana** MIÐFLOKKURIN

Formaðurin í Miðflokkinum kann lýsast sum ein góður **»segment-samskiftari«**. Í fjølmiðlum talar hann beinleiðis við sítt veljarasegment um politisk mál av týdningi fyri júst miðflokkaveljarar. Hann talar eitt mál og brúkar orð og vendingar, ið hesin veljarabólkur kennir seg aftur í. Avbjóðing hansara er at samskifta við aðrar veljaratypur enn miðflokkasegmentið. Tá hann hevur loyst hesa uppgávu, hevur hann stutta leið til at gerast ein meira savnandi politikari heldur enn ein, ið umboðar ein avmarkaðan bólk. Brandið hjá Jenisi av Rana er sterkt, men har er eisini nakað at arbeiða við.